

*Pætur við Keldu sang sum ein dreymur í Føroyahúsinum*

# Gott undirhald fyri føroyingum í Keypmannahavn

**Tað var fullsett í Føroyingahúsinum í Keypmannahavn, tá Pætur við Keldu, Kórið Mpiri og Janus Trúgvason spældu á cafékvøldi har**

Føroyingar hava nógvar frálíkar tónleikarar í øðrum londum, og nakrir av teimum, sum eru búsitandi í Danmark, spældu á cafékvøldi í Føroyingahúsinum í Keypmannahavn næstseinasta vikuskiftið.

Sama kvøld var Pætur við Keldu gestur í væl dámdu donsku sendirøðini, Hit med sangen, sum eisini varð send í føroyskum sjónvarpi hetta kvøldið.

Tey, sum vóru til tiltakið í Føroyingahúsinum, fingu ov mikið av Pæturi, tí umframt at tey kundu fylgja avrikinum hjá klaksvíkinginum í sjónvarpinum, var Pætur eisini millum tónleikararnar á kvøldinum.

Og Pætur hugtók sum vanligt við síni fram úr góðu rødd og klaverspæli.



*Eyðun Nolsøe og Hans Petur Niclasen spældu saman við Pæturi við Keldu*



*Janus Trúgvason og Eyðun Hansen spældu góðan vísutónleik í Føroyahúsinum*

Tað gjørdi ikki framførsluna hjá Pæturi verri, at hann nú hevur funnið saman við tveimum øðrum klaksvíkingum á høvuðsstaðarleiðini, Eyðuni Nolsøe og Peturi Hans Niclasen. Teir tríggir spældu væl saman, og bæði Pætur og Eyðun, sum eisini er ein frálíkur sangari, sungu.

### Spæla eisini í Føroyum

Teir tríggir skulu fyrst í komandi mánaði spæla til eitt serligt tiltak í Norðurlandahúsinum, tá nýggja fløgan hjá Brandi Enni verður avdúkað, og tá fáa føroyingar eisini møguleikan at hoyra teir live.

Umframt hendan bólkin, var vísusangarin Janus Trúgvason eisini at hoyra. Hann spældi saman við Eyðuni Hansen, og teir spældu góðan vísutónleik fyri cafégestunum.

Kórið Mpiri, sum Sunleif Rasmussen stjórnar, sang eisini hetta kvøldið, og tað gav góða breidd í tónleikaliga tiltakið á caféini.

Føroyingahúsið hevur javnan tónleikatiltøk av hesum slagi, og í næsta mánaði fer íslendski Bubbi Morthens at verða millum tónleikagestirnar í húsinum hjá føroyingum í Keypmannahavn.



*Terji Rasmussen fer leygarkvøldið at spæla á Kambsdali við nýggjum bólki*



# Terji við nýggjum bólki á Kambsdali

**Terji Rasmussen og tónleikarar úr Nólsoy manna bólk, sum fer at spæla til dans á Kambsdali leygarkvøldið 30. mars**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Terji Rasmussen hevur nú funnið sær tónleikarar í Nólsoy at spæla saman við. Seinastu mánaðirnar hevur havnamaðurin búð og arbeitt í Nólsoy, og fyrsta ítøkiliga tónleikaliga úrslitið burtur úr hesum verður at hoyra á Kambsdali leygarkvøldið 30. mars.

Terji Rasmussen hevur verið útiseti í fleiri ár, til hann nýliga flutti heimaftur til Føroya. Í Danmark spældi hann nógv saman við Eyðuni Nolsøe, sum framvegis býr í Keypmannahavn. Teir góvu eisini tvær fløgur út saman, og teir spældu á nógvum konsertum og til dansir.

Nú leitar Terji aðrar leiðir, og tað ger hann uttan Eyðun Nolsøe. Terji er farin at spæla saman við tónleikum í Nólsoy, og nú fer hesin bólkurin at royna seg til eitt størri tiltak.

Teir spæla blandaðan tónleik, bæði slíkt sum Terji er kendur fyri at framføra og ymiskt, sum teir sjálvur hava gjørt.

Umframt bólkin hjá Terja Rasmussen fer ein plátuvendari eisini at hava Hit Show 2002.

*Hans Petur í Brekkunum fer hetta vikuskiftið at spæla í Platform*



# New York Night Out

Okkara kendi saxofonistur, Hans Petur í Brekk unum, spælir á Diskoteque Platform hetta vikuskiftið. Hans Petur hevur millum annað spælt saman við Hjarnum og Eyðun & Terja.

Hans Petur í Brekkunum býr í Danmark, her hann er tónleikalærari og yrkistónleikari. Hann spælir við bólkinum TAKE OFF, sum kemur til Føroya í summar. Hann hevur eisini sína egnu kvintett, sum navnið Hans Petur Kvintett sigur. Kvintettin gevur fløgu út eftir páskir.

### Hans Petur LIVE saman við DJ Allan á Platform

Fyri fyrstu ferð fara diskuteque-tónar og saxofontónar at ljóma í Føroyum í senn. Hans Petur fer at spæla saman við DJ Allan Poulsen úr Klaksvík á pallinum á Platform.

New York Night Out: Diskoteque-tónar, Saxofon-tónar, klædningar og butter-fly, ALT hetta á Platform hetta vikuskiftið.